# Dansurin gongur í Havn

**Vanligt er við dansistevnum kring landið og í ár er hon í Havn. Væntandi luttaka eini 500 til 600 fólk**

DANSUR
*Dagfinn Olsen*

Dansifeløgini kring landio hittast rokkso regluliga til dansitiltøk og dansistevnur. Í ár veruur dansistevnan í Havn.

Tann 19. mai skipar Tøkum Lætt og hini dansifeløgini í Havn fyri dansistevnu í Havn. Tao hevur ikki eydnast at fáa oro á formannini felagnum, men væntast kunnu eini 500 - 600 fólk úr øllum landinum til Havnar til hesa stevnu, sigst.

Øll dansifeløg í landinum hittast, tá tey 16 dansifeløgini í Havn tína dansin og bjóða uppí ringin. Umframt vanligu dansitiltøkini, serliga tá dansifioin er, so hevur verio vanligt vio stóru dansistevnunum, har so nógv sum gjørligt koma saman um dansin og har nógv verour gjørt burturúr.

Síoani føroyski dansurin at kalla ikki longur átti sítt náttúrliga pláss í mentanini, hava dansifeløgini hildio lív í, og áhugin tykist stórur. Í dag kann sigast, at føroyski dansurin hevur funnio eina legu í mentanini og at ikki er heilt óskukalt hesum viovíkjandi.

**600 fólk á Vaglinum**

Tao sigst, at ætlanir eru frammi um at seta stevnuna á Vaglinum í Havn. Um ferðafólk tá eru í høvuosstaonum, verða tey óivao bilsin og glao, um tey hitta eini 600 dansandi føroyingar í føroyskum búna í Havnargøtum.



Savnsmynd
















